## UTTAN ÚR HEIMI

# Nú er eftir at telja tey deyðu




*Fleiri gravir eru longu at síggja í New Orleans*
*Mynd: Reuters*

**Ódnin "Katrina" hevur kanska kravt fleiri tíggjutúsund mannalív**

USA
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Eingin veit, hvussu mong mannalív ódnin "Katrina" hevur kravt, men eingin er í iva um, at talan er um fleiri túsund.

Í gjár var tað almenna talið í New Orleans framvegis 59, men amerikanski heilsumálaráðharrin, Michael Leavitt, viðgekk fyri CNN, at tað veruliga talið er nógv størri og ivaleyst fleiri túsund.

Borgarstjórin í New Orleans, Ray Nagin, sigur tað sama.

– Spyr ikki meg, hvussu mong eru deyð. Men vit kunnu hyggja at tølunum. 500.000 fólk vóru í býnum. 80 prosent vórðu flutt burtur. Næstan 50.000 leitaðu sær skjól ymsastaðni. Sostatt eru millum 50.000 og 60.000 eftir. Hvussu mong teirra eru deyð? Eg veit ikki. Kanska 5 prosent, kanska 10 prosent ella kanska 20 prosent. Tey eru í hvussu er mong í tali, segði borgarstjórin við CNN gjáranáttina.

Bjargingarliðini siga, at tey flestu, sum eru deyð, eru eldri og sjúk fólk, men at minst trý pinkubørn doyðu inni í ítróttarhøllini Superdome, har nógv túsund fólk leitaðu sær skjól undan ódnini. Fólk, sum vórðu flutt úr Superdome sunnudagin, greiddu frá, at tey høvdu sæð fleiri lík inni í teirri risastóru høllini.

Bjargingarliðini siga, at arbeiðið er ótespiligt og óhugnaligt. So hvørt sum vatnið fjarar í gøtum og kjallarum, koma lík undan kavi. Tey verða tikin upp fyri at avmarka vandan fyri umfarssjúkum.

### Hvassar atfinningar

So hvørt sum talið á deyðum veksur, harðna atfinningarnar at myndugleikunum. Millum annað fýlast fólk á, at tað gingu fleiri fagar, áðrenn forsetin gav sær stundir til at virja vanlukkuøkið. Onnur fýlast á, at tað tók myndugleikunum fimm samdøgur at útvega teimum neyðstøddu í einum amerikonskum stórbýi mat, vatn og heilivág.

Amerikonsku fjølmiðlarnir hava lagt størri dent á ta vantandi tilbúgvingina, og teir hava eisini gjørt nógv burturúr, at stjórnin skarvaði av játtanini, sum var ætlað at bøta um byrgingarnar við Meksikanska Flógvan. Herfyri bað kreppueftirlitið FEMA um meiri pengar til at styrkja byrgingarnar kring New Orleans, tí serfrøðingar høvdu sagt, at byrgingarnar við býin fóru ikki at halda, kom ein hørð ódn tann vegin. Men stjórnin segði nei.

# Framvegis útlit fyri stjórnarskifti í Noregi

**Men munurin ímillum teir borgarligu og andstøðuna er minni, enn hann hevur verið**

NOREG
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Enn benda veljarakanningarnar á, at Jens Stoltenberg fer at loysa Kjell Magna Bondevik av í starvinum sum norskur forsætisráðharri aftan á valið tann 12. september.

Nýggjasta veljarakanningin, sum kom í gjár, vísir tó, at munurin ímillum teir borgarligu og andstøðuna er minkaður í seinastuni. Arbeiðaraflokkurin hjá Jens Stoltenberg hevur framvegis framgongd, men av tí at Sosialistiski Vinstraflokkurin hevði afturgongd, tódnaði munurin.

Tað avgerandi tykist verða, um tann minsti stjórnarflokkurin, Vinstri, yvirhøvur kemur í Stórtingið aftan á valið. Veljarakanningin í gjár gav flokkinum 3,6 prosent. Minstamarkið fyri at fáa umboð á ting er 4,0 prosent.

## ST rýmir úr Afghanistan

ST ber ótta fyri ófriði upp undir tjóðartingsvalið í Afghanistan, sum verður tann 18. september, og tí hava fleiri deildir hjá ST mælt sínum starvsfólkum til at fara haðani, skrivar AP.

Í seinastuni hava uppreistrarmenn gjørt seg inn á fremmand hjálparfólk, og sunnudagin ávaraði afghanska stjórnin um, at Taliban fer uttan iva at herða ágangin, so hvørt sum valið nærkast. Sunnukvøldið kunngjørdi japanska stjórnin, at tveir japanskir ferðamenn eru funnir myrdir í Afghanistan. Dagin fyri varð ein bretskur verkfrøðingur funnin myrdur har vesturi í landinum. Hann varð burturfluttur í síðstu viku.

Sambært myndugleikunum í Kabul eru minst 1.000 fólk deyð í álopum teir seinastu seks mánaðarnar, og sunnudagin doyðu átta løgreglumenn og eitt valevni í einum álopi.

Adrian Edwards, sum er ST-talsmaður, segði í gjár, at heimsfelagsskapurin hevur mælt sínum starvsfólkum í Afghanistan til at fáa sær frí hetta til valið, tí viðurskiftini eru alt ov ótrygg.

## Saddam-málið skal útsetast

Í Irak hava myndugleikarnir gjørt av, at rættarmálið ímóti fyrrverandi forsetanum Saddam Hussein skal byrja tann 19. oktober, men nú vilja tey avvarðandi og verjarnir hava málið útsett.

Abdel Haq Alani, sum er ein av verjunum, sigur við AP, at hann og hinir verjarnir fáa alt ov stutta tíð til at fyrireika seg til rættarmálið. Hann vísir á, at ákæruvaldið hevur kannað fleiri túsund skjøl tað seinasta árið, uttan at verjarnir hava fingið atgongd til teirra. Tað ber í sær, at verjarnir fáa bara ein mánað til at seta seg inn í øll skjølini, og tað er fullkomiliga burturvið, sigur Alani.

Í fyrsta umfari er Saddam Hussein ákærdur fyri at hava givið boð um at myrða 143 shiamuslimar í býnum Duijali í 1982. Verður hann funnin sekur, kann hann fáa deyðarevsing. Sjey fyrrverandi medarbeiðarar hjá Saddam eru ákærdir í sama máli, teirra millum fyrrverandi fregnartænastustjórin Barazan Ibrahim. Hann og Saddam eru hálvbrøður.

## Leivdirnar funnar

Í 1970 hvarv tann 24 ára gamli fjallaklintrarin Gúnther Messner undir einari ferð oman av pakistanska fjallinum Nanga Parbat.

Gúnther Messner hevði verið uppi á fjallinum saman við bróðurinum Reinhold, sum ofta hevur verið fyri atfinningum, tí fólk vilja vera við, at hann rýmdi frá bróðurinum. Tað hevur Reinhold avsannað. Hann vil tvørturímóti vera við, at eitt skalvalop tók bróðurin.

Nú heldur Reinhold Messner, at fólk í Pakistan hava funnið leivdirnar av Gúnther. Á einum tíðindafundi um vikuskiftið hevði hann einar skinnskógvar, sum eru funnir á Nanga Parbat, og sum bróðurin var í. Sambært Reionhold Messner hava fólk eisini funnið klædnapetti og hár á staðnum.

Reinhold Messner, sum nú er 61 ára gamal, er ein tann best kendi fjallaklintrarin í heiminum. Hann var tann fyrsti, sum fór niðan á Mount Everest einsamallur, og hann var eisini tann fyrsti, sum megnaði at koma niðan á øll tey 14 fjøllini, sum eru meiri enn 8.000 metrar høg.

## Setti knívin á málning

Ein 35 ára gomul týsk kvinna kann vænta sær fongsulsrevsing, eftir at hon gjørdi seg inn á ein málning á einari framsýning í Wien.

Kvinnan stóð og eygleiddi málningin "Nude in mirror" hjá Roy Lichtenstein, tá hon brádliga tók ein knív úr lummanum og randi hann í málningin. Løgreglan í Wien sigur, at málningurin fekk fýra skeinur, sum eru einar 30 centimetrar langar.

Ein stovnur í New York eigur "Nude in mirror", sum er smáar 40 millióni krónur verdur.